**Holocaust og gerningsfólk**

*Holocaust* snýr seg um royndina hjá nazistiska stýrinum hjá Adolfi Hitler at týna óynsktar borgarar, sokallaðar innanhýsis fíggindar, fyrst og fremst jødar. Longu áðrenn Hitler og nazistarnir fingu valdið í Týsklandi, søgdu teir greitt, at teir ynsktu eitt sterkari Týskland fyri "veruligar týskarar", og at jødar ikki kundu roknast sum veruligir týskarar. Antisemitisma (jødahatur) hevði verið sera útbreidd í Europa í fleiri 100 ár, men higartil høvdu antisemitiskir politiskir flokkar ikki fingið nógvar atkvøður. Sambært nazistunum vóru jødar tó ein serlig *rasa*, sum ikki kundu broytast til tað betra; allir teirra keðiligu og spillandi eginleikar vóru teimum *íbornir*.

Í 1932 var nazistaflokkurin størsti flokkur í Týsklandi, og í 1933 megnaði Hitler at savna valdið hjá sær, og banna aðrar flokkar. Longu í 1933 byrjaði nazistiska stýrið at stovna konsentratiónslegur, fyrst og fremst fyri at handtaka, pína og drepa politiskar fíggindar, t.e. fólk, ið ikki stuðlaðu Hitler.

Við tíðini fevndi "innanhýsis fíggindar" m.a. um brotsfólk, biddarar, fólk, ið ikki vildu arbeiða, fólk, ið bóru brek, sálarsjúk, samkynd og jødar. Felagsskapurin, SS, fekk uppgávuna at reka hesar konsentratiónslegur. SS-menn vóru fullkomiliga lýdnir móti Hitler, og teir sluppu at virka út um lógina. Teir skuldu vera sera kaldir og harðligir, teirra herróp var, "*tolsemi er veikleiki*". SS skuldi fremja nazistiska rasu-politikkin í verki. Leiðarin hjá SS, Heinrich Himmler, ynskti ikki, at fangar skuldu latast leysir aftur, men at teir skuldu avbyrgjast frá samfelagnum fyri lívstíð. Eisini ynskti hann, at jødarnir skuldu týnast; allir jødar: menn, kvinnur og børn. Hitler stuðlaði Himmler.

Frá 1938 vórðu jødar handtiknir og sendir á konsentratiónslegur eina av tí grund, at teir vóru jødar. Tá kríggið byrjaði í 1939, vóru SS-deildir sendar út at savna og skjóta jødar eystanfyri í Póllandi, Baltisku londunum, Ukraina og Russlandi. Men Politiið var eisini undir SS tá. Hetta merkti at vanligir politistar, sum eisini høvdu havt vanligar politi-uppgávur, áðrenn Hitler fekk valdið, eisini fingu hesa uppgávu; at drepa menn, kvinnur og børn.

Í 1941 royndu nazistarnir at finna effektivar hættir at hópdrepa jødar. Á stovnum fyri fólk, ið bera brek, og fyri sálarsjúk, høvdu SS gassað patientar. Hesin drápsháttur varð síðani førdur á legurnar, sum nú vóru *týningarlegur*; legur við gasskømrum, við endamáli at hópdrepa.

Í *Wannsee-fundinum* 20. Januar í 1942 samráddust umboð úr stýrinum, vinnulívinum og SS, um hvussu teir skuldu útinna "endaligu loysnina á jødaspurninginum". Eftir hetta fóru hópdrápini fram á týningarlegum. Jødar úr øllum hertiknum londum skuldu sendast eystureftir í *ghetto'ir*, og síðani til týningarlegur. Skrivstovur syrgdu fyri, at tok við fangum komu á rætt

stað, at teirra viðføri og virðislutir vóru ognartikin til statin – eisini gulltenn –, at talið av handtiknum og dripnum var skrásett o.s.fr.

Hetta tykist í stóran mun skipað og kliniskt, men vitnisfrágreiðingar lýsa hesi átøk heilt ræðuligt. Legurnar vóru tilætlað vánaligar, við óliviligum umstøðum, so at fólk svóvu illa, høvdu vánalig reinførisviðurskifti, og fingu nærum onki at eta. Tá fólk vórðu gassað, var tað als ikki serliga *humant*. Fólkini kvaldust, og royndu at sleppa úr gasskømrunum, við at troka ímóti úthurðini til fánýtis. "Arbeiðsjødar" høvdu bæði uppgávuna at føra fangar inn í gasskømrini, og at rudda upp aftaná. Líkini vórðu brend, og beinleivdirnar knústar. Ofta kappaðust týningarlegurnar um at drepa mest, og tískil drupu tey meir, enn ovnarnir megnaðu at brenna. Hetta førdi til, at opnar hópgravir vóru í legunum, har líkini vórðu brend, og at tilvildarligar sendingar av fangum vóru hópskotnar, ella doyðu fangarnir í tokvognunum í køini.

Gongdin helt fram heilt fram til krígslok, so leingi til bar. Týskararnir ynsktu at rudda øll spor, sum sameindu herarnir nærkaðust. Hetta megnaðu teir ikki til fulnar. Sum russisku herarnir nærkaðust í 1945, tóku týskararnir fangar við sær vestureftir til Týsklands. Hetta verður kallað "deyðsmarsjurin". Týskararnir koyrdu fangar í legur vestanfyri, har teir hildu fram at pína teir. Hesar legur vórðu nú ómetaliga yvirfólkaðar, og legan, Bergen-Belsen, er eitt gott dømi. Lík lógu allastaðni, og sjúkur, sum tyfus, breiddust millum fangarnar.

Týskarar taptu kríggið, og fangarnir vórðu fríaðir. Sameindu hermenninir vóru forfardir, tá teir upplivdu legurnar og neyðars fangarnar. Hóast teir royndu at bjarga hesum fangum, doyðu nógvir stutt eftir at teir vóru fríaðir. Summir doyðu av tí grund, at magarnir vóru minkaðir so nógv av svøltanini, at kropparnir megnaðu ikki at inntaka vanligar mongdir av mati.

Samanumtikið vóru uml. 14 milliónir fólk dripin undir *holocaust*, harav uml. 6 milliónir jødar. Av jødiskum ofrum vóru uml. 2,7 millónir gassað, 1,2 mió vóru skotin, uml. 800.000 doyðu av vánaligu umstøðunum í ghetto'unum og uml. 1,2 mió doyðu av vánaligu umstøðunum í konsentratiónslegunum. Um allar legur verða taldar við, vóru meir enn 6000 legur. Flestu legur vóru í Póllandi, og har vóru týningarlegurnar. Men uml. 730 legur vóru í Týsklandi. Hvussu ber tað til, at fólk lótu hetta henda? Hví tóku so nógv fólk lut í hesum? Hetta evnið er umstrítt, og fleiri ymisk boð eru. Kendu tey seg bara sum *eina tonn í tannhjólunum* í maskinarínum? Var tað *propaganda*? Kendu tey *trýst* frá yvirmonnum? Ella *ynsktu* tey at fremja hetta?

Tá alt kemur til alt, er talan jú ikki um tøl, men um menniskju og menniskjalív. Bæði offur og gerningsfólk vóru menniskju. Tað, sum doyði undir Holocaust, vóru dreymar, ynski, vinarsambond, systkin, foreldur, makar, ommur, abbar, børn, ommu- og abbabørn... og øll tey verk og teir tankar sum hesi kundu lagt eftir seg.